# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Hanna Lisberg 80 ár

Mánadagin 14. august fylti Hanna Lisberg í Havn 80 ár.

Hanna er fødd og uppvaksin í Vági. Foreldrini vóru Elisa Bæk úr Hovi og Johan A. Toftum úr Vági.

Hon giftist við Jens Lisberg úr Fámjin. Sum nýgift búðu tey í Fámjin, har Hanna luttók í bygdasamfelagnum, hon gekk t.d. til neyta og fekst við tøting. Væl lá eisini fyri hjá henni at hekla, binda og annars alt til hendurnar.

Seinni fluttu tey til Vágs at búgva. Jens var til skips og Hanna arbeiddi í handli.

Síðst í 50-unum fekk Jens arbeiði í Mjørkadali, tá var Hanna læraravikarur í Kaldbak. Hon gjørdi eisini mat til arbeiðsfólki í Mjørkadali.

Í 1960 fór hon á Føroya Læraraskúla, meðan hon gekk har arbeiddi hon



eisini í kiosk Centrum. Lærarapróvgið fekk hon í 1964.

Meðan hon gekk á læraraskúlanum, var hon í starvsvenjing á deyvaskúlanum á Skansa, og tá hon varð liðug, fekk hon starv á Føroya Spesialskúla og seinni á Skúlin á Trøðni. Fyrstu árini var skúlin ein deild av deyvaskúlanum við Kastelsvej í Keypmannahavn. Hon arbeiddi á skúlanum til 1996, tá hon sum 70 ára gomul fór úr starvi.

Í sínum arbeiði sum lærari var Hanna á nógvum ymiskum skeiðum viðvíkjandi serundirvísing, bæði í Danmark, Norra, Svøríki, Finnlandi, Eysturríki og Íslandi. Hetta gjørdi hon av sínum eintingum og fyri egna rokning, ofta í summarferiuni. Hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri teimum, sum eru minni ment og brekað.

Hanna hevur altíð havt stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum og luttikið í almenna orðaskiftinum við t.d. at skriva lesarabrøv og at ringja inn í sambandi við kjaksendingar í útvarpinum. Hon hevur eisini verið virkin politiskt og hevur sitið á tingi sum eykafólk fyri Javnaðarflokkin.

Hann hevur havt fleiri nevndarstørv bæði í lands- og kommunalum nevndum. Hon sat t.d. mong ár í barnaverdinini í Havn. Hon var virkin í Kvinnufelagnum, og í hesum sambandi var hon blaðstjóri á “Kvinnutíðindum”. Hon sat eisini í mong ár í nevndini fyri Føroya Handilsskúla, vald av Føroya Landsstýri.

Hon sat í mong ár í nevndini í Færøernes Ulykkeforsikringsråd, har hon saman við øðrum tók støðu til hjálparveitingar til sjúk og brekað. Har kom tað væl við hjá henni, at hon kendi so nógv fólk kring landið.

Tað eru nokk fleiri, sum eru vaksin í dag, sum minnast hana sum Hanna mostur í barnaútvarpinum, har hon t.d. fekk børnini at skriva inn til barnaútvarpið. Hon hevur eisini umsett fleiri barnabøkur, mest úr íslendskum og svenskum sum t.d. “Ásta og Eldgosið” og “Pippi Smokkuleggur”, sum varð lisin upp í útvarpinum.

Hanna er ein sannur náttúruelskari. Fyrr fiskaði hon nógv síl, og hon hevur eisini staðið nógv á seiðabergi. Ta einu tíðina stóð hon so nógv á seiðabergi, at onkur í skemti nevndi hana Hanna Seiðaberg. Hon hevur sungið í kóri bæði í Vági og í Havn. Eisini sang hon nógv í skúlanum, og hon hevur glett mong við síni vøkru songrødd.

Hanna og Jens eiga tveir synir: Dánjal Johan, sum er giftur føroyskari konu og býr í Danmark, og Eli sum býr í Havn. Ommubørnini eru fimm, og langommubørnini eru átta í tali.

---

*framhald av síðu 10*

fastlagt, hvør eigur fiskin og hvør hevur atgongd til fiskin.

Tey, ið útflyta heilan fisk, sum eru ein týdningarmikil partur av fríu prískappingini og tey óheftu virkini, sum ofta eru smá og hava »spesialiserað« seg innan onkra »serframleiðslu« hava í veruleikanum ongan møguleika at keypa henda fisk, hetta kann hava sera óhepnar fylgjur fyri fiskivinnuna í Føroyum. Serliga eru tað tey smærru framleiðsluvirkini og bygdirnar sum koma at líða undir hesi gongdini.

Um vit í Føroyum framhaldandi vilja hava, at tað skal verða møguleiki hjá teimum smærru óheftu virkjunum at klára seg, má tryggjast at hesi eisini hava atgongd til rávøruna.

Fyri at allir fiskakeyparar/framleiðarar (bæði føroyskir og útlendskir) skulu hava somu atgongd til keyp av rávøruni, eigur ongantíð ov skjótt at verða sett í gildi við løgtingslóg, at botnfiskur veiddur av føroyskum skipum í føroyskum sjóøki skal seljast yvir uppboðssøluna.

Alt annað er beinleiðis kappingaravlaging og endar við kartellum, sum í m. a. ES er bannað við lóg.

### Trinnar grund reglar

Eg vil mæla til, at vit innføra trinnar grund reglar fyri fiskivinnuna í Føroyum. Teir eru:

1. Allur fiskur veiddur undir Føroyum skal uppá land í Føroyum
2. Allur fiskur veiddur undir Føroyum skal seljast um eina uppboðssølu.
3. Uppboðssølan skal verða ein non-profit uppboðssøla, sum hevur sum evsta endamál at serviserað fiskaseljarar og fiskakeyparar bæði føringar og útlendingar.

Allur fiskur uppá land í Føroyum – Hví tað kann tú spyrja?

Endamálið við tí er:

1. at tryggja at marknaðurin fyri fiska keyp er heima í Føroyum, soleiðis at allir keypara (føroyskir og útlendskir) kunnu á jøvnum føti keypa fiskin í Føroyum.

2. at stimbra arbeiði til vinnuna her á landi, her verður hugsað bæði um landingarmiðstøðir, flutningsfeløg, framleiðarar og útflytarar. Eisini vil hetta geva flutningsvinnuni til útlandið betur møguleikar at menna tænastustøði tey bjóða. (Hugsast kann at hetta vil skapa grundarlag fyri eini avskipan úr Føroyum mitt í viku.)

3. Fyri útlendsku keypararnar eigur hetta ikki av verða nakar trupulleiki tí er einans spurningur um flutning tvs. skulu teir hava vøru úr Føroyum , so gjalda teir tað sama fyri flutningin, sum arðir útflytarar gera. Spælireglarnir er tær somu fyri allar.

Eitt av argumentunum hjá virkjunum fyri at keypa skipini, er at tryggja rávørutilgnogdina. Men, um kravt verður at allur fiskur skal á land í Føroyum og at allur fiskurin skal bjóðast út á uppboðssølu, vil hetta verða besta trygd fyri eitt og hvørt virkið í Føroyum er líkastillað í rávørutilgongdini – einasta kravið er, at goldið verður marknaðarprísur.

Fyrimunir við at allur fiskur veiddur undir Føroyum skal seljast um eina uppboðssølu

Fyrimunirnir er nógvir við at allur fiskur verður seldur um eina uppboðssølu. Millum annað vildi hetta gjørt:

a) at øll virkir og bátar eru líka fyri lógini
b) at fiskimenn fáa rætta marknaðarprís. (um ein uppboðssøla skal hava rætta marknaðarprís (prís dannandi) mugu stórar nøgdir fara ígjøgnum marknaðin)
c) at allir keyparar veittu fulla trygd fyri keypspengingin
d) at kredittíðin var líka fyri allar keyparar
e) at allir keyparar á jøvnum føti kundu bjóða upp á fiskin
f) at gjøgnumskygnið gjørdist størri/betri
g) at øll hagtøl verða tøk
h) at gjaldið til uppboðssøluna fer niður - hetta er sera umráðandi - serliga tá hugsað verður um bílig fiskasløg sum t. d. upsan.
i) at tað ikki er neyðugt at tengja skip og virkir saman, tí frí atgongd verður til allan fisk.
j) at sporførið kundi verði betur fyriskipað

Møguligir vansar:

a) Ráfiskaseljarar eru ræddir fyri, at virkini kunnu avtala prís sínámillum, og tá er ikki møguleiki hjá seljarunum at gera avtalu við keyparar.
b) Prísásetan (minsti prísur) PO Prísir

### Avtala millum virkir.

Proforma sølu trupulleikin

Ein trupulleiki við hesum kann verða tær sokallaðu Proforma sølurnar. Trupulleikin við proforma sølum er, at tað ikki bara er eittans rætta svarið, tá talan er um proformasølur. Dømir eru um sølur, sum í dag ikki verða mettar sum proformasølur, men sum seinni kunnu vísa seg at verða proformasølur, og hinvegin eru tað sølur, har ein ikki við vissu kann siga, at hetta nú er ein proformasøla, men sum seinni vísur seg at hava verið proformasøla.

Málið er ikki heilt so einfalt sum tað sær út til, og mæli eg tí staðiliga frá at skriva »konkretar« reglur á hesum øki, ið kunnu verða darvandi fyri góðum mannagongdum hjá fiskivinnuni, men vil hinvegin heldur mæla til eina fleksibla loysn, sum áhaldandi hevur »fingurin á pulsinum«.

### Halda eygað við proformasølum

Fiskimálaráðið eigur at seta eina eina 4 manna nevnd, sum kann hava eftirlit við, um sølurnar á uppboðssøluni eru veruligar, ella um talan er um proformasølur. Henda nevnd skal verða ein nevnd sum fiskakeyparar kundu klaga til, um teir meta at ein søla er proforma søla.

Møgulig klaga skal vera nevndini í hendi, innan sjálv sølan fer fram.

Nevndin kann sjálvsagt eisini fylgja við og møguliga steðga sølum, uttan at hava fingið nakra formliga klagu um nevndin er viss í at sølan er proforma søla.

Henda nevnd, ið skal vísa til Fiskimálaráðið, kundi tá álagt uppboðssøluni at avlýst sølur, um hildið varð, at talan var um eina proforma sølu (ein háttur er eisini, beinleiðis at nokta fyri at skriva »Keypsváttan«, til slíkar útvaldar sølur).

Avgerðin um hetta skal sjálvandi takast, áðrenn sjálv sølan ferð fram.

Avgerðin hjá nevndini skuldi havt greiðan meiriluta.

Um ikki at nevndin var samd - um tað eru tveir móti tveimum, skal umboðið hjá Fiskimálaráðnum hava fulltrú til at taka avgerð.

Nevndin skal setast av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, har Fiskimálaráðið er arbeiðsmyndugleikin.

Umboðini nevndini skulu vera persónar, ið dagliga arbeiða við uppboðssølu, - v. ø. o. hava »fingurin á pulsinum« og neyvt innlit í hesi viðurskiftir, og til fulnar kenna mannagongdinar og eru vitandi um skiftandi marknaðarviðurskiftir.

Nevndin eigur at verða mannað av einum umboð fyri hvønn av niðanfyri nevndu bólkum.

· Fiskaframleiðari
· Ráfiskaseljari
· Fiskimálaráðið
· Fiskamarknaðin

Ein tílík nevnd kundi arbeitt skjótt og »fanga« nýggjar »kreativar« háttir at fremja proformasølur. Henda nevnd kann eisini fylgja við og rokna seg fram til, hvørt ein søluháttur vísir seg at verða ein proformasøla. Ein slík »Proformasølu-Nevnd« kundi verið mannað og farið til verka innan eina viku og vildi hetta verið ein skjótur máti at steðga hesum trupulleika sum framvegis er tilstaðar, hóast lógin ikki loyvur hesum sølum.

Klagur um avgerðina hjá Proforma-Nevndini skulu sendast til Fiskimálaráðið.

### Politiska skipanin

Tað er ivaleyst at tríva í fyri at gera skipanina trygga og eins nýtiliga fyri allar aktørar á marknaðinum, bæði fyri skipaeigarar, virkiseigarar og keyparar/seljarar sum heild - tað er skipanin ikki í verandi líki, so langt frá tí.

Kunnu vit sum løggevarir verða tjentir við tað??

Vágur 14.08.2006